# Tað stendur ikki væl til í Fuglafirði

**ÍF fór orduliga í spønir ímóti KÍ, sum við stórsigri eisini fekk málmunin at venda rætta vegin, áðrenn teir fóru at hvíla seg**

ÍF-KÍ
*Jóannes Hansen*

Tað var ikki lukkuligt, sum klaksvíkingar tóku fyri sær, tá ið teir vitjaðu í Fuglafirði fyri fyrstu ferð, síðani teir eftir fjórðingsfinaluna í steypakappingini stóðu vónbrotnir eftir tepra tapið.

Fuglfirðingar hingu toluliga uppií fyrra partin av fyrra umfarinum. Tá ið unglingaspælarin Julian Samuelsen við fínum stútara - akkurát sum grikska málið í fjórðingsfinaluni - hevði lagt KÍ framum, vóru greiðar ábendingar um, hvønn veg tað bar, og tá ið Jacob Bymar dygst undan steðginum hevði økt til 3-1, var tað meiri ein spurningur um, hvussu stórur sigurin hjá KÍ fór at verða, heldur enn um tað skuldi eydnast hjá ÍF at koma afturíaftur.

Jacob Bymar skoraði til 3-1, tá ið hann úr heilt stuttari fjarstøðu snittaði bóltin upp um Karstin Joensen. Hesa ferð var Jacob Bymar á framrættaða miðvallarplássinum, sum Atli Danielsen annars plagar at vera á. Atli var á verjukenda miðvallarplássinum, sum Jan Joensen hevur havt. Saman við teimum báðum vóru Leon Bjartalíð og Símun Joensen á KÍ miðvøllinum. Klaksvíkingar høvdu nógv pláss at dusa sær á, og ÍF verjan hevði torført at ansa Erlingi Fles og Juliani Samuelsen.

Tá ið Jacob Bymar í fjør kom til Klaksvíkar, segðist hann vera maðurin, sum skuldi skjóta málini. Tí gekk tað illa við. Nú tykist Jacob Bymar rættuliga at hava fingið høvdið fyri seg í Klaksvík. Hann er skjótur, altíð klárur at taka lut í samanspælinum, og so vísti hann sunnudagin á álopskenda miðvallarplássinum máltevið, sum tað í fjør ongantíð sást nakað til. Tá ið hann setti hol á, varð hann spældur úr høgru og inn um verjuna, og hann var púra kaldur og fullur í sjálvsáliti, tá ið hann setti framvið málverjanum.

Tá ið KÍ tíggju minuttir eftir steðgin skoraði til 4-1, var talan um fínt uppspæl í høgru og flatt innlegg, og soleiðis var tað eisini, tá ið teir skoraðu til 5-1. Í øðrum av hesum førinum hevði KÍ marginalirnar rættuliga við sær. Eftir ÍF horna úr høgru stútaði Hanus Eliasen í stólpan. Fuglfirðingarnir høvdu armarnar omanfyri høvd, men linjuverjin og dómarin søgdu einki. Jákup Mikkelsen fekk fatur á bóltinum, tveitti í høgra borð, har Harley Bertholdsen, sum nú hevur vunnið sær pláss aftur á liðnum, spældi skjótt, bólturin fór heilt fram í hornið, og tað var púra sóttreinsað fyri reyðar troyggjur, tá ið bólturin kom inn undir málið.

### Lítið sjálvsálit

Heimaliðið tóktist ikki hava serliga stórt sjálvsálit. Teir royndu viðhvørt at spæla fótbólt, men tað miseydnaðist ofta. Í fleiri av plássunum vóru ikki teir spælararnir, sum hava verið roknaðir at vera stuðulsspælarar, og tað kostaði. Verjan var ógvuliga lítið avgjørd, og álopsparturin var rættuliga tunnur.

ÍF fekk mál við brotssparkið, tá ið eitt stórt korter var farið. Teir sektaðu stórt verjumistak hjá KÍ. Ove Nysted royndi sum aftasti maður og í høgra borði at fara framvið tveimum spælarum. Tað eydnaðist í fyrra førinum, men so fingu fuglfirðingar fatur á, Hanus Eliasen kom í brotsteigin í vinstru, taklingin hjá Niclasi Niclasen kom ov seint, og Høgni Zachariasen setti úr ellivu metrum bóltin flatt og umvegis stólparótina og í málið.

Sum tíðin leið, var tað eyðsýnt, at ÍF ikki hevði nógvar streingir at spæla uppá. Nógvir kvalifiseraðu seg til útskifting. Fleiri spælarar vóru á beinkinum, og onkrir hitaðu upp, men tað var bara ein nýggjur maður settur á vøllin. Tað mundi ikki kennast sum herðaklapp til ómóðu menninir, sum neyvan vóru serliga uppsettir, tá ið teir fóru at spæla í 3. deild og ímóti sørvingum.

ÍF sleppur ikki í summarfrí fyrrenn leygarkvøldið, tá ið teir á Varmakeldustevnu hava spælt seinnu hálvfinaluna í steypakappingini ímóti NSÍ. Avrikið sunnudagin bendi ikki á, at ÍF skal vera annar parturin í finaluni ólavsøkudag. Men tað kann við einum góðum vilja eisini vendast tann vegin, at ÍF longu hevði hugsanirnar snaraðar ímóti hálvfinaluni.

Tað er einki at siga til, at klaksvíkingar vóru væl nøgdir. Julian Samuelsen vísti seg at vera ágrýtnan og skilagóðan álopsspælara, Harley Bertholdsen, Jacob Bymar og Erling Fles vóru eisini sannførandi, og hinir høvdu heldur ikki trupulleikar. Men tað skal framvegis havast í huga, at mótstøðuliðið hevði so lítið at bjóða uppá, sum neyvan nakað annað lið í bestu deildini hevur í løtuni.




*Jacob Bymar hjá KÍ gjørdi ikki mætari enn at skora tríggjar ferðir, tá ið klaksvíkingar vóru á vitjan í Fuglafirði sunnudagin.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**ÍF-KÍ 1-6 (1-3)**
0-1: Jacob Bymar 13.
1-1: Høgni Zachariasen 17.
1-2: Julian Samuelsen 25.
1-3: Jacob Bymar 45.
1-4: Erling Fles 56.
1-5: Jacob Bymar 76.
1-6: Erling Fles 89.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**ÍF:** Karstin Joensen - Árni Petersen, Áki Petersen (John Thomsen, 63.), Viggo Johannesen, Tostein Joensen - Eyðolvur R. Petersen, Eyðun Rygshamar, Høgni Zachariasen, Frileif í Lambanum - Atli Petersen, Hanus Eliasen
**Gult kort:** eingin
**KÍ:** Jákup Mikkelsen - Harley Bertholdsen, Ove Nysted, Niclas Niclasen, Marek Wierzbicki (Jákup Hansen, 74.) - Leon Bjartalíð, Atli Danielsen, Jacob Bymar (Arnhold Joensen, 77.), Símun Joensen (Frank Joensen, 81.) - Erling Fles, Julian Samuelsen
**Gult kort:** eingin

## Balling aftur á kendar leiðir

**Fyrrverandi NSÍ spælarin er nú aftur í Vejle, har hann verður liðfelagi og kappingarneyti hjá Christian Høgna Jacobsen**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Ulrik Balling er kent navn í føroyskum fótbólti. Upprunaliga spældi hann í Vejle, og nú hevur hann skrivað nýggjan sáttmála við Vejle. Har verður hann liðfelagi við Christian Høgna Jacobsen. Christian Høgni er framvegis skaddur í knænum. Tá ið hann fer at verða komin fyri seg aftur eina ferð í vár, fara teir báðir at kappast um pláss í Vejle álopinum. Teir hava áður verið liðfelagar í NSÍ.

Fyri tveimum árum síðani var Ulrik Balling í NSÍ. Hóast hann var skaddur stóran part av tíðini, so skoraði hann fýra mál, og tey vóru hvørt týdningarmikið enn annað og millum orsøkirnar til, at NSÍ rakk silvurkrónunum, ið er tað hægsta, sum teir higartil hava rokkið í landskappingini.

Hóast áhugi var í Runavík at halda fram við samstarvinum við danska álopsspælaran, so spurdist einki burturúr. Balling hevði hug at royna, hvussu langt hann kundi røkka í Danmark, men tað hevur ikki gingið nakað serligt. Møguleikarnir fyri stórum inntøkum í donskum fótbólti hava verið smáir. Útboðið av brúkiligum spælarum hevur verið størri enn eftirspurningurin.

Síðsta árið hevur Ulrik Balling spælt í FC Aarhus. Felagið hevur verið umboðað í næstbestu deildini. Tað eydnaðist ikki at varðveita plássið. Teir taptu stríðið at sleppa undan niðurflyting eitt nú við Vejle. Nú hava Ulrik Balling og tveir liðfelagar hjá honum skrivað sáttmála við Vejle Boldklub, ið fyrireikar seg í vónini um, at tað skal hilnast betri næsta ár, enn tað hevur gjørt síðsta árið. Nýggjur venjari í Vejle er Frank Andersen, sum áður hevur verið venjari í eitt nú SønderjydskE, ið hann flutti upp í superliguna við.

Ulrik Balling, sum er 29 ára gamalur, er ættaður av Sælandi. Hann spældi fyrst í Slagelse og síðani í Næstved, áðrenn hann royndi fótbóltsevnini í Tromsø í Noregi. So spældi hann í Aarhus Fremad, sum FC Aarhus tá nevndist, og síðani fór hann til Vejle, har hann spældi 80 dystir og skoraði 24 mál, áðrenn hann flutti til Føroya.

## Johan heldur fram

**Føroyski landsliðsspælarin verður í verjuni hjá Horsens í hvussu so er í tvey ár afturat**



ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Hann verður nevndur útiseti, tí hann býr í Danmark, og tí hann er ein av teimum, sum kappast um plássini á føroyska fótbóltslandsliðnum. Hann hevur ongantíð búð aðra staðni enn í Danmark, og harvið er hann ikki útiseti. Men hann er føroyskur landsliðsspælari, tí bæði foreldrini eru ættað úr Føroyum, og tí hann hevur valt at umboða Føroyar.

Tað er Johan Byrial Hansen, sum er á skránni. Hann hevur verið í Horsens verjuni seinsatu árini, og nú er greitt, at har fer han at vera í hvussu so er tvey ár afturat. Í vikuni hava Johan og Horsens skrivað nýggjan sáttmála.

Í vár gekk ikki væl hjá Horsens. Eftir framúr væl eydnað heyst við stórari úrtøku og oddasessi, sum legði upp til superligu fótbólt eftir summarfrítíðina, varð nógv mist í vár, og Horsens endaði á triðja plássinum.

Men leiðslan í felagnum tykist hava verið væl nøgd við avrikið hjá Johan. Hann hevur viðhvørt verið vongverji í vinstru, og ofta hevur hann verið í miðverjuni saman við Mads Rieper, sum áður hevur spælt við AGF. Johan royndi seg eitt skifti í OB. Har eydnaðist honum ikki at vinna pláss á besta liðnum, og nú hevur hann eitt skifti verið aftur í Horsens, har hann altso fer at halda fram tvey tey næstu árini.

# Tað gongur rætta vegin

**KÍ venjarin segði seg vera ovurfegnan, men ikki skakkan av, at tað hesa ferð eydnaðist hansara at vinna stórsigur í Fuglafirði**

FYRSTU FERÐ Í 62 DAGAR
*Jóannes Hansen*

Ove Flindt-Bjerg fer í vikuni av landinum í stutta summarfrí og til Vejle, har hann á DBU skeiði fer at leita eftir íblástri til venjingina. Hann verður tískil ikki á beinkinum, tá ið KÍ mánakvøldið í næstu viku fer at spæla í Klaksvík ímóti FCK og Toda Jónsson.

Tað er einki at siga til, at KÍ venjarin sunnudagin var fegin. Í fyrsta umfarinum, sum var Flaggdagin, vann KÍ 1-0 á heimavølli ímóti ÍF. Síðani tá hevur KÍ ikki vunnið aftur fyrrenn nú í Fuglafirði ella tveir mánaðir og tveir dagar eftir fyrsta sigurin.

– Tað gongur rætta vegin, men tað gongur ikki so skjótt, og úrslitini eru ikki so góð, sum fótbóltsáhugaðu norðoyingarnir vilja hava tað at gera, staðfesti Ove Flindt-Bjerg, sum segði seg vera serliga fegnan um, at tað hevði gingið væl hjá ungu monnunum.

– Hesa ferð var Julian Samuelsen við frá byrjan, og Jákup Hansen og Frank Joensen komu inn. Hetta eru alt spælarar, sum ivaleyst fara at gera seg galdandi, men tað eru teir fægstu, sum gerast 1. deildarspælarar soleiðis beinanvegin. Fyri felagið hevur tað týdning, at tað er tilgongd alla tíðina, og tað haldi eg meg síggja, at tað nú fer at vera. Vit hava havt trupulleikar at fáa mál. Hesa ferð glapp tað orduliga hjá Jacob Bymar og Erlingi Fles, og Julian Samuelsen skoraði eitt fínt mál. Men tað er langt á mál, og vit fara at halda fram við arbeiðnum, tá ið spælararnir hava hvílt seg í eina góða viku, segði KÍ venjarin.

Higartil hevur tað ikki verið frítt, at klaksvíkingar hava kent niðurflytingarvandan hótta. Hóast teir vunnu á ÍF, so eru teir framvegis niðarlaga á talvuni. Men tað eru so mikið nógv stig aftur til ÍF og B68, at sannlíkið fyri fyrstu KÍ niðurflytingini á hundrað ára føðingardags árinum má metast at vera lítið og einki.

# Bárður er givin at spæla

**Eingin teirra, sum undan hesum kappingarárinum kom til Fuglafirðar at hjálpa til, var á liðnum sunnudagin - burtursæð frá málverjanum**

ÍF Í KREPPU
*Jóannes Hansen*

Tá ið ÍF fór undir fyrireikingarnar til royndina at standa seg í bestu deildini, ásannaðu teir, at tað var neyðugt at styrkja liðið, sum í fjør vann 2. deild, við nøkrum spælarum. Ein teirra var málverjin. Tá ið Jákup Mikkelsen var komin aftur til Klaksvíkar, flutti Karstin Joensen til ÍF. Har hevur hann roynst væl, og hóast seks mál fóru ígjøgnum sunnudagin, so var einki at siga til avrikið hjá málverjanum.

Tilgongdin úti á vøllinum var Magni á Lakjuni, Bárður á Lakjuni, Rúni Elttør og Bartal Eliasen. Eingin teirra var á liðnum sunnudagin. Bárður á Lakjuni hevur altíð havt ógvuliga góð fótbóltsevni. Hann hevur altíð verið plágaður av skaðum. Tað hevur hann eisini verið í ár. Nú hevur hann verið í Danmark fyri at vita, um nakað kann gerast fyri at fyribyrgja knæskaðarnar. Tað ber ikki til, og nú hevur Bárður gjørt av at gevast at spæla fótbólt. Tað er væl skiljandi, at teir í ÍF harmast um støðuna, men teir siga seg eisini skilja avgerðina.

Magni á Lakjuni hevur verið skaðaplágaður. Hann var á beinkinum sunnudagin, men hann hevur ikki vant, og hann varð ikki settur inn. Bartal Eliasen var um vikuskiftið við flogbóltslandliðnum uttanfyri landoddarnar.

Tá ið ÍF spældi ímóti B68, var fyrrverandi B36 spælarin, Jan Guttesen, á miðvøllinum. Hann hevur verið niðri aftur, men sunnudagin var hann aftur í Fuglafirði. Hann slapp kortini ikki framat. Spæliloyvið var ikki komið úr ÍF Føroyum og umvegis DBU og FSF og til ÍF. Fyri ÍF var tap sera óheppið, at teir ikki høvdu syrgt fyri hesum.